# ATV 4 x 4 SÚKKLUR

YAMAHA





**Grizzly 660 FWA**
4x4, Automatgear + bakgear
Kr. 78.000,- við mvg.

Fígging kann útvegast

**Kodiak 450 FWAN**
4x4, Automatgear + bakgear
Kr. 68.000,- við mvg.

YAMAHA 5 YEARS WARRANTY



P/F ALMA

Á Hjalla 15, Hoyvík Telefon 31 58 90 Fax 31 04 68 Mail Eli@alma.fo



Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska mynduleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Á Stjórnardeildini eru 3 starvsfólk í fulltíðarstarvi og ein deildarleiðari. Starvsøkið hjá Stjórnardeildini fevnir um ráðgeving og vegleiðing av leiðslu og starvsfólk í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum, gerð av innanhýsis leiðbeinandi reglum og kunningartilfari innanhýsis, kæruummæli, ummæli av lógar- og kunngerðaruppskotum o.a..

ENDURLÝSING:

## Almannastovan søkir eftir løgfrøðingi

Løgfrøðingurin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er at løgfrøðingurin er virkin og nærlagdur, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Starvið er eitt fulltíðarstarv á Stjórnardeildini. Arbeiðsuppgávunar hjá løgfrøðinginum fevna um ráðgeving og vegleiðing í løgfrøðiligum og øðrum spurningum, ummælan av uppskotum til lógir og kunngerðir, málsviðgerð, tilevnan av innanhýsis leiðbeiningum og kunningartilfari innanhýsis og úteftir, luttøku í tvørfakligum samstarvi og aðrar uppgávur á deildini.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 26. august 2005 kl. 12.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo